**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
International Life Saving Federation (ILS)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Saltangará 14. mai 2020

# Venjingartilmæli SSF í sambandi við Corona

Sum ment út í frá uppskotum frá svimjifeløgunum, og í samráð við coronaráðgevingina

- Vit fylgja øllum almennum tilmælum, sí https://corona.fo/tilmaeli
- Tað eru altíð tey somu sum venja í senn, og ongantíð fleiri enn tilmælt
- Kravda frástøða skal haldast av øllum allastaðni, so sum í móttøkuni, í umklæðingini, undir brúsuni, á kantinum og í hylinum
- ~~Um svimjarar svimja aftaná hvørjum øðrum, so eigur frástøðan at vera minst 4 metrar millum hvønn svimjara, tann vegin sum tey svimja~~
- Øll halda seg til at nýta einans persónliga útgerð, og lána ongum sítt, so sum t.d. svimjibrillur, fitjur, snorkil, plátur, vatnfløskur, hettur, stopp-ur og klæðir
- Alt persónligt skal goymast við greiðari frástøðu til tað hjá øðrum, so sum í persónligari tasku ella í persónligum skápi
- Hitarúm og líknandi verður ikki brúkt
- Um sjúkueyðkenni eru, ið benda á coronavirus, so sum hosti ella fepur, so skal viðkomandi verða heima og testast áðrenn hann/hon kann møta til venjing aftur
- Svimjararnir skulu fáa greið boð um hesar venjingarreglur, áðrenn fyrstu venjing
- Øll uppmøting skal skrásetast neyvt, so at til ber at síggja hvør ið møtti nær

Vegna Svimjisamband Føroya

Rókur í Jákupsstovu, formaður

ATLANTIC AIRWAYS